LM-114/2020
FYLGISKJAL 8

Hanna D. Andreassen

Fra: Yrkisdepilin
Sendt: Wednesday, January 27, 2021 14:52
Til: Tóri Højgaard
Cc: Alfred Petersen
Emne: Hoyringssvar frá Yrkisdeplinum til Uppskot til løgtingslóg um at fremja KT-heildarætlanina fyri undirvísingarverkið

Hoyringssvar frá Yrkisdeplinum til Uppskot um løgtingslóg um at fremja KT-heildarætlanina fyri undirvísingarverkið

Yrkisútbúgvingarøkið og yrkisnám verður nevnt fleiri ferðir í kapitli 1.

Yrkisdepilin heldur, at um her ikki einans meinast við skúlapartin av einari yrkisútbúgving, men eisini lærupartin, ið verður umsitin av Yrkisdeplinum, so er umráðandi, at Yrkisdepilin er aktivur partur av verkætlanini.

Nógv fólk nema sær yrkisútbúgving ígjøgnum lærlingaskipanina.

Læruplássgóðkenningar, ið Yrkisdepilin umsitur, eru fortreytin fyri, at lærupláss kunnu veita sín lut í yrkisútbúgvingum/yrkisnámi.

Yvir 1300 lærlingar høvdu ein aktivan lærusáttmála okkurt tíðarskeið í 2020. Umleið 40% av øllum lærlingum koma ongantíð í samband við føroyskar skúlar ígjøgnum eina yrkisútbúgving, tí skúlagongdin verður tikin í Danmark. Er ynski um, at yrkisútbúgvingarnar skulu takast við í hesa verkætlanina og ikki einans føroyski skúlaparturin av einari yrkisútbúgving, so er umráðandi, at Yrkisdepilin er við í sjálvari tilgongdini at menna skipanina og ikki einans verður kunnaður, tá verkætlanin er komin á mál.

Arbeiðsmarknaðarpartarnir hava ábyrgd av yrkisútbúgvingarøkinum saman við landsstýrismanninum. Leikluturin hjá arbeiðsmarknaðarpørtunum verður umsitin av Yrkisdeplinum. Heitt verður tí á UMMR um at Yrkisdepilin, saman við hinum pørtunum innan skúlaverkið, verður tikin við í stýrisbólkin fyri verkætlanina.

Vinaliga / Kind regards,

Randi Frederiksberg
Leiðari / Manager

YRKIS depilin

Hoyvíksvegur 72 · Postboks 9 · FO-110 Tórshavn
+298 21 20 00 · randif@yrkisdepilin.fo · **yrkisdepilin.fo**

Fra: Tóri Højgaard <ToriH@ummr.fo>
Sendt: 19. januar 2021 21:48
Til: Almannamálaráðið <amr@amr.fo>; Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>; VMR-Journal <uvmr-journal@uvmr.fo>; Undirvísing <undirvising@uvs.fo>; Fiskimálaráðið Journal <fisk@fisk.fo>; Heilsumálaráðið <hmr@hmr.fo>; Journalin hjá LMS <journalin@tinganes.fo>; Gjaldstovan <gjaldstovan@gjaldstovan.fo>; Nám <nam@nam.fo>; dat@dat.fo; Yrkisdepilin <yrkisdepilin@yrkisdepilin.fo>; FMA <fma@fma.fo>; Fróðskaparsetur Føroya <setur@setur.fo>; Vinnuhúsið <industry@industry.fo>; lararaf@lararafelag.fo; yf@yf.fo; akf@akf.fo; blf@blf.fo; jorginv@tsk.fo; Talgildu